# VEÐRIÐ Í MIKLADALI



## APRÍL 2024

## VEÐURSTOVA FØROYA

# Innihald

Mikladalur ..... 3
Veðrið í bygdini ..... 4
Norðan ..... 6
Landnyrðingur norðan ..... 6
Landnyrðingur ..... 6
Landnyrðingur eystan ..... 7
Eystan ..... 8
Landsynningur eystan ..... 8
..... **Fejl! Bogmærke er ikke defineret.**
Landsynningur ..... 8
Landsynningur sunnan ..... 9
Sunnan ..... 10
Útsynningur sunnan ..... 11
Útsynningur ..... 11
Útsynningur vestan ..... 12
Vestan ..... 12
Útnyrðingur vestan ..... 12
Útnyrðingur ..... 13
Útnyrðingur norðan ..... 13

**Dagfesting**: 23. apríl 2024

**Staður**: Faktorsvegur 14 – 700 Klaksvík

**Heimildarfólk:** Óli Olsen

**Viðtal við**: Hanus Kjølbro

## Mikladalur

Mikladalur er bygd á eystursíðuni norðalaga í Kalsoy – í einum djúpum dali millum høg fjøll.

Kalsoyarfjørður er eystan fyri bygdina – úr vesturhallum norði niður í landssynning sunnan.

Tey høgu fjøllini norðan- og sunnan fyri bygdina ávirka veðrið í bygdini, og tey eru, ávikavist:

- Kambur
- Gásafjall (606m)
- Millum fjøllini er ein fjallarøð um 300 metrar høg. Millum røðina og Kamb er Hálsur, sum er eitt sindur lægri.




Mynd 1: Kort av Kalsoy. Mikladalur sæst í reyða kringinum

## Veðrið í bygdini

Veðrið í Mikladali er tengt at ættini, sum tað er í øllum støðum í Føroyum.

Kemur hann undan Heystmúlanum, norðast á Kunoy, kann vera nógv brim, men er hann bert eitt sindur lægri, er einki brim. Kunoyggin stendur fyri og forðar bæði fyri vindi, brimi og regni.

Liggur ættin beint norður ígjøgnum fjørðin, er veðrið gott í bygdini, tí lotið kemur ikki innat. Tær góðu ættirnar eru úr eystri, suðurum og upp í útsynning.

Útsynningur er góð ætt, men fer hann upp í útsynning vestan, er tað tað ringasta ættin til vind.

Fyri at fáa greiði á hvussu veðrið er á teimum ymsu ættunum í Mikladali, setti undirritaði seg í samband við Óla Olsen (**ÓO**), sum er ættaður úr Mikladali, vaks upp har. **ÓO** flutti úr bygdini til Klaksvíkar, tá ið hann var ungur, men hevur alla tíðina havt hús og jørð í Mikladali og hevur verið nógv har.

Við til samrøðuna, sum var í hølunum hjá Veðurstovu Føroyar á vestaru bryggju í Klaksvík, hevði eg spurnarblað – til allar 16 ættirnar, ið vanliga eru umtalaðar í bygdini:

- Er vindurin javnur ella ójavnur á ættini
- Er meira vindur í ættini enn aðrasteðs – ella øvugt
- Er ættin vát – t.e. regn, tá ið turt er aðrastaðni – ella øvugt
- Er hetta mjørkaætt?
- Er ættin vanliga ein góð ætt ella ein ring ætt – ber til at siga tað við fáum orðum?
- Onnur viðurskifti um ættina, søgur, fyribrigdi, hendingar o.s.fr.

Spurt varð somu spurningarnar ætt fyri ætt. Byrjað varð við norðan, og var farið allan kringin runt eystureftir, og steðgað var við heil- og hálv- og millumættirnar.

Spurningar og svar og aðrar viðmerkingar síggjast aftast í hesum skjali.




*Mynd 2: Tær 32 ættirnar. Til samrøðuna eru ikki allar 32 ættirnar brúktar, men onnurhvør - t.e. heil-, hálv- og millumættirnar.*

## Norðan
Tá ið ættin er norðan, kemur lotið undan Kambi, og flókar kunnu fara vestur eftir røðini.

Ættin er góð til vind, tí tað lívir undir Kambi. Tað er lítið av jøvnum vindi vindur í bygdini, hóast nógvur vindur er kring landið. Tað kann vera ófantaligt úti á fjørðinum, og nógv brim, men lítil vindurin í bygdini.

Tá ið tað kemur til avfall, so kann vera nógv regn í bygdini, og kavaælingar eisini. Sum heild eru høgættirnar keðiligar til avfall. Mest ælaveður.

Norðan er ikki nøkur serlig mjørkaætt, men tað eru mjørkaflókar viðhvørt.

Norðan er brimætt í Mikladali. Allar høgættirnar eru brimættir, úr landnyrðingi í útnyrðing.

Ættin er ikki góð nakað uttandura nakað í Mikladali, tí tað er so kalt. Hon kann hvørki brúkast til hoyggj ella máling. Hon er ikki skaðaætt í ringum veðri.

## Landnyrðingur norðan
Tá ið ættin er landnyrðngur norðan, líkist veðrið í Mikladali veðrinum, tá ið hann er landnyrðingur.

## Landnyrðingur
Landnyrðingur kemur undan Heystmúlanum og inn ímóti bygdini. Ættin strekkir heim á Bust – sum er ímillum Ritudal og Villingardal.



*Mynd 3: Ímóti landnyrðingi*

Landnyrðingur er ein góð ætt í Mikladali. Vindurin er yvirhøvur javnur, og í illveðri kunnu hvirlur vera. Men ættin er ikki skaðaætt í illveðri.

Í ringum veðri koma hvirlu niðan ígjøgnum ánna, og hetta er tað einasta, sum fólk miðskeiðis í bygdini hoyra til vind av landnyrðingi í illveðri.

Tá ið tað kemur til avfall, er landnyrðingur svikaligur – sum hinar høgættirnar. Fyri tað mesta er talan um ælaveður, ikki samregn.

Í góðveðri á sumri, tá ið sólin skínur, og fólk eru í hoyna, síggjast viðhvørt ælingar koma undan Heystmúlanum og fara suður við Kunoynni og allan vegin til Klaksvíkar. Teir koma ikki út á fjørðin ella nærri Kalsoynni.

Vanliga er ikki mjørki á landnyrðingi, men flókar kunnu síggjast á sumri í góðveðri fara suður við Kunoynni.

Tað kann vera nógv brim av landnyrðingi. Bátar máttu viðhvørt dragast úr stóra neystinum longur niðan undan uppgangi. So nógv brim er viðhvørt, at sjógvur rennur oman ígjøgnum neystið.

## Landnyrðingur eystan

Ættin líkist landnyrðingi, men sleppur ikki líka langt heim. Hann sleppur illa nokk heim til Mikladals.



*Mynd 4: Ímóti landnyrðingi eystri*

## Eystan

er ein sera góð ætt í Mikladali. Kunoyggin lívir, bæði fyri vind og avfalli. Hann sleppur hvørki suðureftir ella norðureftir.



*Mynd 5: Ímóti eystri*

Vindurin er javnur, og tað er lítil vindur í illveðri.

Ættin er ikki vát, regnið hongur eftir yvir Kunoynni.

Eystan er ikki mjørkaætt, men bert eitt sindur onkuntíð. Heldur ikki er brim á ættini.

## Landsynningur eystan

Veðrið á landsynningi eystri líkist veðrinum á landsynningi.

## Landsynningur

Landsynningur er ein sera góð ætt í Mikladali. Hon er besta terraættin í bygdini. Við útnyrðingi er tað øvugt.



*Mynd 6: Ímóti landsynningi*

Vindurin er javnur í bygdini, og tað hoyrist ikki nógv til hann heimi í bygdini, tá ið tað er illveður. Úti á Magnusmørk hoyrist eitt sindur.

Landsynningur er ikki skaðaætt í Mikladali.

Ættin er yvirhøvur turr, men tað kann viðhvørt regna ógvuliga illi, tá ið brúgvaløgini eru omanfyri. Tá ið hann støkkur vesturum, slítur í.

Landsynningur er ikki ring mjørkaætt, men tað kann vera mjørki viðhvørt. Slavtoka kann liggja í Klaksvík og norður um Húsar, meðan tað er fínasti terri í Mikladali.

Brim er ikki í Mikladali á landsynningi. Tað er kyrt.

## Landsynningur sunnan

Veðrið á landsynningi suðuri líkist veðrinum á suðuri.



*Mynd 7: Ímóti landsynningi suðuri.*

## Sunnan

Sunnan er góð ætt í Mikladali. Allar ættirnar millum eystan og útsynning er góðar. Líka sum við landsynningi, so liggur hann norður ígjøgnum fjørðin og kemur ikki inn at bygdini.



*Mynd 8: Ímóti suðuri*

Á suðuri er javnur vindur, og vindferðin er minni enn hon er kring landið. Tað er ongantíð nógvur vindur á suðurætt, hóast nógvar glaður eru á fjørðinum, tá ið tað er illveður.

Ættin er ikki vát, men er brúgvalag við regni oman fyri Føroyar, so kann regna illa, til hann støkkur vesturum – líka sum við landsynningi.

Nakað mjørka kann vera, tá ið hann er sunnan. Dalurin kann fyllast.

Sunnan er ikki brimætt.

## Útsynningur sunnan

Útsynningur sunnan er sum sunnan.

## Útsynningur

Allar ættirnar úr eystri, suðurum og upp í útsynning eru góðar ættir í Mikladali.

Tað er lítil vindur í Mikladali, tá ið hann liggur av útsynningi. Lotið sleppur hvørki niðan eftir dalinum ella omaneftir. Veðrið kann vera gott í Mikladali, hóast rættiliga nógvur vindur er kring landið.

Yvirhøvur er ættin turr, men tað kann vera ælaveður.

Á útsynningi kann vera eitt sindur av mjørka, men einki brim.

## Útsynningur vestan

Útsynningur vestan er ringasta ættin til vind – ringasta skaðaættin bygdini. Púra stilt er millum hvirlurnar, vit kunnu bresta ein svávulspinn millum húsini í bygdini, men so koma hvirlurnar rullandi oman ígjøgnum dalin.

Í hoyna kundi alt hoyggið fara í havið – ikki eitt stráð var eftir á bønum.

## Vestan

Vestan er ein vindætt í Mikladali. Hann kemur oman av Hálsi.

Tað er altíð vindur – eisini tá ið lítil vindur er kring landið – og hann er sum oftast javnur. Tað er bert í ógvuliga lítlum vindi kring landið, at tað ikki er vindur í Mikladali á vesturætt.

Á veg á fjall er tað ikki meir, enn at fjallmenninir trekkja niðan eftir gjøgnum dalin. Komnir niðan á Hálsagarð, kundu teir standa beint út og inn, men komin niður um stíggin, er stilli. Teir kunnu bresta ein svávulspinn, uttan at hann sløknaði.

Vestan er ikki regnætt, men okkurt ælið er viðhvørt. Heldur ikki er mjørki á ættini, helst tí at vindurin er ov nógvur.

Tað er ikki brim á vestri, men tað kann vera nógvur súður við lendingina undir Hálsinum.

Fólk í Mikladali halda lítið um vesturættina.

## Útnyrðingur vestan

Veðrið í Mikladali, tá ið ættin er útnyrðingur vestan, er sum á útsynningi vestri. Ein ógvuliga keðilig vindætt.



*Figure 9 Ímóti útsynningi vestri*

## Útnyrðingur

Útnyrðingur er ein keðilig og vánalig ætt – og nokkso løgin eisini.

Um summarið, tá ið veðrið er av tí besta í bygdini við brennandi sólskini, og fólk hava verið á bønum og rist út, kann brádliga – uttan ávaring – eitt grovt æl koma. Einki tekn er um ælið, sum kemur oman av Dighamri.

Vindurin er eitt sindur ójavnur, men ikki so ójavnur sum vestan.

Útnyrðingur er ein vát ætt í Mikladali, og grov æl kunnu vera.

Ættin er ikki mjørkaætt, men tað kann vera brim. Í nógvum vindi kann vera nógv brim, tó ikki líka nógv sum á landnyrðingi.

Útnyrðingur kann ikki brúkast til nakað uttandura í Mikladali.

## Útnyrðingur norðan

Útnyrðingur norðan er ein hampulig ætt í Mikladali. Hon líkist útnyrðingi til ælaveður og vind. Fer hann upp í norðan, verður stilli í bygdini.